# Barnanna umboðsmaður

**Orð: Hanna Vang –** Mynd: Pavla Eliasen, Fotostudio.

*Løgtingsins umboðsmaður er eisini barnanna umboðsmaður og ansar eftir, at myndugleikar og stovnar lurta eftir sjónarmiðum hjá børnum og ungum og virða rættindi teirra.*

## Barnanna umboðsmaður hevur fýra høvuðsuppgávur:

- At viðgera klagur og spurningar, ið snúgva seg um børn. Klagurnar og spurningarnir kunnu vera bæði frá børnum og vaksnum.
- At taka mál upp sjálvur, har illgruni er um, at børn ikki hava verið rætt viðfarin. Hetta kunnu t.d. vera mál, sum koma fram í fjølmiðlunum.
- At vitja almennar og privatar stovnar, har sum børn eru, og fosturfamiljur, har meira enn eitt barn er. Vit kanna, um stovnarnir og fosturfamiljurnar halda allar lógir og reglur, og um børnini hava tað gott.
- At ansa eftir, at Barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin í Føroyum.

## Eftirlit við ST-Barnarættindasáttmálanum

Samleikin „Barnanna umboðsmaður" var skaptur fyri at varpa ljós á arbeiðið hjá umboðsmanninum á barnaøkinum. Umboðsmaðurin virkar sum ein óheftur klagu- og eftirlitsmyndugleiki á barnaøkinum á sama hátt, sum umboðsmaðurin røkir vanliga virksemið sítt.

Umboðsmaðurin kann alment finnast at, koma við tilmælum, og annars gera vart við meting sína av málum, hann hevur kannað. Umboðsmaðurin skal boða Føroya Løgtingið og landsstýri frá, um hann í sambandi við kanningar sínar kemur fram á lógir og fyrisitingarligar ásetingar, sum ikki eru sambæriligar við Barnarættindasáttmálan.

Barnanna umboðsmaður skal ikki meta um og



vísa á meira generell viðurskifti í samfelagnum viðvíkjandi børnum ella eitt nú gera viðmerkingar til lógaruppskot.

## Umboðsmaðurin kunnar fegin

Ein heimasíða við kunning, tilfari um Barnarættindasáttmálan og klagumøguleikanum til umboðsmannin er á www.bum.fo.

Umboðsmaðurin sær tað sum sína uppgávu at kunna. Tí hevur umboðsmaðurin til dømis boðið seg til at vitja fólkaskúlar í Føroyum fyri at greiða børnum frá Barnarættindasáttmálanum og klagumøguleikanum til umboðsmannin.

## Brekrættindasáttmálin og umboðsmaðurin

Í 2022 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu viðvíkjandi einum barni, har grein 7 í brekrættindasáttmálanum var við í niðurstøðuni. Sum eitt dømi um, hvussu umboðsmaðurin arbeiðir á hesum økinum, verður ein samandráttur av málinum givin. Niðurstøðan kann lesast í síni fullu longd í savninum á heimasíðu umboðsmansins, www.lum.fo undir heitinum *Álit um vantandi ansing á dagstovni av barni, sum ber brek (LUM 22/16132).*

Umboðsmaðurin viðgjørdi í 2022 eina klagu um, at ein kommunalur dagstovnur sýtti fyri at veita einum barni, sum ber brek, ansing í tveir dagar, tí einki starvsfólk var at taka sær av barninum.

Klagarin førdi fram, at kommunan gjørdi mismun á børnunum í kommununi, tí barn klagarans var einasta barnið á dagstovninum, sum var sýtt ansing hesar báðar dagarnar. Dagstovnurin hevði skipað seg soleiðis, at eitt starvsfólk (stuðul) var um barnið burturav. Stuðulin hevði sagt seg úr starvi til 1. september 2022, men hevði játtað at halda fram í ein til tveir mánaðir aftrat, meðan kommunan royndi at finna nýggjan stuðul til barnið. Stuðulin kundi tó ikki byrja í nýggju setanini fyrr enn tann 6. september 2022. Dagstovnaleiðarin kom til ta niðurstøðu, at starvsfólkaorka ikki var at veita ítøkiliga barninum ansing tann 2. og 5. september 2022, tí stuðulin hjá barninum ikki var byrjaður í nýggju setan síni enn.

Umboðsmaðurin helt seg ikki kunna taka støðu til ítøkiligu metingina og raðfestingina hjá dagstovnaleiðaranum av, hvussu starvsfólkaorkan og arbeiðið best varð skipað á stovuni hjá ítøkiliga barninum og dagstovninum hesar báðar dagarnar, har stovnurin var raktur av sjúku og sjúkramelding.

Umboðsmaðurin vísti á grein 7 í brekrættindasáttmálanum, og at sambært brekrættindasáttmálanum hevur staturin bæði eina negativa og eina positiva skyldu mótvegis fólki, sum bera brek. Staturin má ikki skerja frælsisrættindi hjá fólki, sum bera brek, og skal samstundis syrgja fyri bygnaðarligum og individuellum tillagingum til tørvin og møguleikum hjá fólki, sum bera brek, soleiðis at tey kunnu luttaka og verða inkluderað í samfelagið.



Umboðsmaðurin helt, at skipanin av starvsfólkahópinum á dagstovninum hvørki var í samsvari við § 5 í Dagstovnalógini og viðmerkingunum til ásetingina ella við grein 7, stk. 2 í brekrættindasáttmálanum, tí dagstovnurin hevði skipað seg soleiðis, at bara eitt einstakt starvsfólk — stuðulin — skuldi taka ábyrgd av barninum, sum ber brek. Tilboðið um ansing av barninum var tí sera viðbreki fyri, at hetta starvsfólkið barst frá at møta til arbeiðis, hevði frí ella segði upp.

Umboðsmaðurin gav kommununi eina átalu fyri, at dagstovnurin hevði skipað seg soleiðis, at neyðugt var at sýta barninum, sum ber brek, ansing nevndu dagarnar.

Umboðsmaðurin tók til eftirtektar, at myndugleikin í sambandi við klagumálsviðgerðina boðaði frá, at dagstovnurin var í ferð við at umskipa arbeiðið, soleiðis at øll starvsfólk á stovuni hjá ítøkiliga barninum, umframt leiðslan, fingu førleikar til og kundu taka ábyrgd av ansingini av barninum.

Eitt annað dømi um niðurstøðu hjá umboðsmanninum á barnaøkinum er skriv um undirvísingina av einum næmingi í Skúlanum á Trøðni (LUM 22/22596), sum kann lesast í savninum á heimasíðu umboðsmansins, www.lum.fo.

## Mál av egnum ávum

Umboðsmaðurin nýtist ikki at bíða eftir eini klagu, men kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar. Mál av egnum ávum kunnu vera mál viðvíkjandi einstøkum borgara ella avgerð, men kunnu eisini vera kanningar av einum ávísum slag av málum ella málsviðgerð hjá til dømis einum ávísum stovni. Slíkar kanningar kunnu lýsa heil øki. Umboðsmaðurin avger sjálvur, hvørji mál hann tekur upp av egnum ávum, men virðismetir í hesum sambandi kunning frá borgarum um møgulig mál.

Sum mál av egnum ávum hevur umboðsmaðurin eitt nú møguleika at kanna, hvussu løggáva, sum tryggjar, at børn fáa høvi at gera síni sjónarmið galdandi, verður hildin. Dømi um slíkar kanningar eru:

» Kanning av eftirlitsvitjanum hjá barnaverndartænastunum (LUM 22/12208), har umboðsmaðurin kannaði, um barnaverndartænasturnar gera tær eftirlitsvitjanir og hava tær barnasamrøður við børn, sum eru sett heiman, sum eru ásettar í § 16, stk. 3 í Barnaverndarlógini.
» Kanning av næmingaráðum í fólkaskúlanum, frískúla og serskúla (LUM 21/19719), har umboðsmaðurin við støði í ásetingum í fólkaskúlalógini og frískúlalógini um næmingaráð og grein 12 í Barnarættindasáttmálanum kannaði, hvussu næmingaráð sambært fólkaskúlalógini eru skipað, og hvussu ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum grein 12 og grein 25 verða fylgdar.

## Eftirlitsvitjanir

Umboðsmaðurin kann gera eftirlitsvitjanir á stovnum, har børn eru. Tá ið slík vitjan verður gjørd, ger umboðsmaðurin eina meting av eitt nú umstøðunum, tilboðnum og mannagongdunum á staðnum. Í viðmerkingunum frá lógarbroytingini til umboðsmanslógina í 2014 verða eftirlitsvitjanir lýstar soleiðis:

Metingarnar hjá umboðsmanninum í frágreiðingunum frá eftirlitsvitjanunum byggja á tvey ymisk grundarløg. Tað fyrra er eitt eftirlit við, at ásetingar viðvíkjandi stovninum og búfólkunum verða hildnar. Harumframt hevur umboðsmaðurin eisini eitt eftirlit, sum mest av øllum kann sigast at byggja á menniskjanslig sjónarmið við tí fyri eyga, at búfólkini hava møguleika at liva eitt gott lív. Hetta hevur ofta fingið umboðsmannin at mæla til broytingar í fysisku kørmunum, betri viðlíkahaldi, betri tilboðum um frítíðarítriv o.a.

Umboðsmaðurin ætlar at gera eftirlitsvitjanir á barnaøkinum næsta ár. Í sambandi við eftirlitsvitjanirnar verður skriv sent til myndugleikan um at kunna børn og avvarðandi um vitjanina við innbjóðing til eina samrøðu. Umboðsmaðurin vónar, at avvarðandi taka sær stundir til at biðja um samrøðu, so umboðsmaðurin kann fáa betri innlit í viðurskiftini á stovnunum. ■

